# Vind-skaði á Kambs-dali

**Nógvi vindurin í gjár tók eitt bundi av takplátum, sum lógu við timburhandilin á Kambsdali**

Randi Jacobsen

Hóast nógvan vind og oysandi regn í gjár, fekk politiið bara eina fráboðan um skaða.

Fráboðanin kom frá einum fólki, sum ferðaðist eftir vegnum á Kambsdali, har vindhart er. Viðkomandi sá, at eitt heilt bundi av timbri var farið og flog og fokið omaneftir.

Eingin skaði stóðst av hesum.

# Minni stuðul til neytakjøt

**Bøndurnir fáa í ár minni stuðul til neytakjøt, tí játtanin er minkað**

Randi Jacobsen

Í fjør varð stuðulin 25 krónur sum bøndur á útoyggj fingu fyri kila av neytakjøti. Tann upphæddin er lækkað til 22 krónur í ár.

Á meginøkinum er stuðulin minkaður úr átta krónur niður í fimm krónur kilo.

Búnaðarstovan hevur lækkað prísirnar, tí játtanin er minkað úr 700.000 niður í 500.000 krónur. Verður stuðulin ikki minkaðar, er vandi fyri, at samlaða játtanin ikki røkkur.

# Kennir seg ikki aftur í kritikkinum



Gunnar í Liða, fyrrverandi stjóri, nú nevndarformaður í TF Holding, sigur í stuttari viðmerking við Rás2, at hann ikki kennir seg aftur í tí, sum Javnaðarflokkurin ber fram.

Nevndarformaðurin vísir á, at lønarlagið í leiðsluni og nevndini í TF Holding er munandi lægri enn á øðrum líknandi stovnum.

Tær fýra milliónir, sum hann fekk fyri at fara frá sum stjóri, er ein kappingarklausulur, sum er ein partur av einari gamlari avtalu millum seg og nevndina, sigur Gunnar í Liða.




# Sendið hugskot við SMS

Um fólk hava onkur tíðindi, sum tey halda, at miðlarnir í Miðlahúsinum áttu at tikið upp, so ber til at senda slík hugskot sum smsboð til 285004.

# Tryggingar-samsýningar koma nú í tingið

**POLITIKKUR Katrin Dahl Jakobsen, tingkvinna, fer mikudagin at seta Johan Dahl, landsstýrismanni, fyrispurning um samsýningar hjá Tryggingarfelagnum Føroyar**

Eirikur Lindenskov

Tryggingar-samsýningar koma nú í tingið

Málið tær fýra milliónirnar, sum Gunnar í Liða fekk fyri at fara frá sum stjóri í Tryggingarfelagnum Føroyar, og hækkaðu samsýningarnar til nevndarlimirnar, verður nú reist á tingi.

Mikudagin tá munnligir fyrispurningar eru á skrá í Løgtinginum, fer Katrin Dahl Jakobsen at seta Johan Dahl landsstýrismanni munnligan fyrispurning um viðurskiftini við nevndarvali, valbæri og samsýningum í Ognarfelagnum Tryggingartakaranna.

Eisini verður spurt um, hvønn leiklut Tryggingareftirlitið og Tryggingarráðið hevur í slíkum málum, sum mugu sigast at verða av almennum áhugað.

Í gjár sendi Javnaðarflokkurin út eina yvirlýsing, har flokskleiðslan harðliga átalaði at fyrrverandi stjórin hevur fingið fýra milliónir krónur fyri at fara frá, og at nevndin hevur hækkað sína egnu samsýning munandi.



*Katrin Dahl Jakobsen, løgtingskvinna, fer at seta Johan Dahl fyrispurningin*

# Marjun fær norðurlendska barnabókavirðisløn

**BÓKMENTIR Marjun Syderbø Kjelnes hevur vunnið norðurlendska barnabókavirðisløn**

Eirikur Lindenskov



Dómsnevndin í norðurlendska skúlabókavarðafelagnum hevur á fundi í Keypmannahavn gjørt av, at Norðurlendska barnabókavirðirslønin 2011 skal fara til Marjuna Syderbø Kjelnæs fyri ungdómsbókina *Skriva í sandin*, sum varð givin út av Bókadeild Føroya Lærarafelags í fjør.

*Skriva í sandin* er ein sokallaður stuttsøguringur fyri ung. Har eru 10 stuttsøgur, sum hava hvør sín høvuðspersón. Tíðin og staðið er eitt vikuskifti í Havn. *Skriva í sandin* lýsir við djúpari innliving tiggju vanlig, føroysk ungfólk, sum tey liva lív teirra í dag, 2010 – við teimum hugsanum, ynskjum, longslum og kenslum, sum tey hava. Teir tíggju høvuðspersónarnir, 5 dreingir og 5 gentur, eru millum 16 og 20-21 ár.

Stuttsøgurnar greiða hvør sær frá, hvussu hesi ungu fyrireika seg til eitt ávíst vikuskifti. Í øllum søgunum eru flashbacks, sum geva lesaranum størri fatan av hvørjum høvuðspersóni sær og sambandinum og – lagnufelagsskapinum – teirra millum. Øll hava ikki sjónligar leiklutir í lívinum hjá hvørjum øðrum, men kortini krossast lagnur teirra í hesum samansettu søgunum um ungdómslívið í Havn í dag. Sjónarhornið skiftir frá søgu til søgu, soleiðis at vit sum lesarar uppliva hendingarnar sæddar frá høvuðspersóninum.

Tey ungu berjast við somu trupulleikar sum ung aðrastaðni: foreldsilsi, øvundsjúku, vinabond, gentu, dreingir, etingarólag, harðskap, happing, misnýtslu, sex, homoseksualitet, foreldur. Marjun vísir í søgunum, at hon torir viðgera trupulleikar, sum annars ikki hava verið lýstir serliga væl í føroyskum ungdómsskaldskapi. Hon skrivar beinleiðis til tey ungu brúkar eitt lætt gerandismál, sum tey ungu kenna seg aftur í.

Marjun Syderbø Kjelnæs, sum hevur skrivað stuttsøguringin, er fødd í Havn í 1974. Marjun er útbúgvin sjúkrarøktøarfrøðingur, men hevur seinastu árini skrivað burturav. Í 2009 fekk Marjun játtað starvsløn í 3 ár frá Mentanargrunni Landsins.